# Fiskavirking: Nógv fáa ikki




**HÚSAGANGUR** Vit fara ikki at klára at avgreiða allar umsóknirnar um Als í kjalarvørrinum á húsaganginum hjá Fiskavirking, sigur Ernst Jacobsen, stjóri

Áki Bertholdsen

Tað eru mong, sum mugu fyrireika seg til at halda eini jól við lítlum og ongum pengum, nú Fiskavirking er farið á húsagang og fleiri hundrað fólk eru komin í Als at kalla sama dag.

Als hevur nevniliga ikki starvsfólkaorku til at avgreiða allar umsóknirnar fyri jól.

– Tað er heilt óhugsandi at vit fara at klára at avgreiða allar umsóknirnar fyri jól, staðfestir Ernst Jacobsen, stjóri í Als, í kjalarvørrinum á húsaganginum hjá Fiskavirking.

Sostat verða tað tíverri mong, sum ikki fara at fáa útgjald frá Als fyri jól.

Stjórin er í veruleikanum ikki serliga bjartskygdur um útlitini hjá teimum nýliga arbeiðsleysu.

– Eg veit ikki um eg so frægt sum kann siga, at vit fara at klára at avgreiða tær flestu umsóknirnar fyri jól, leggur hann afturat.

### Gera alt

Ernst Jacobsen sigur, at talan er um einar 700-800 umsóknir um arbeiðsloysisstuðul, sum ALS nú fær í einum høggi.

Afturat hesum hevur ALS einar 100 umsóknir liggjandi frá fólk, sum eru uppsøgd ymsar aðrastaðni enn í ALS.

– Sostatt hava vit einar 800-900 umsóknir, sum skulu skrásetast og viðgerðast og tað er heilt ómøguligt at hugsa sær, at ikki nógvar av teimum verða noyddar at bíða eftir útgjaldið til eftir jól.

Hann sigur, at í ALS gera tey alt, sum stendur í teirra makt av avgreiða so nógvar umsóknir sum gjørligt fyr jól.

Okkara partur skal so ikki liggja eftir.

– Men vit hava ikki meiri enn fimm málsviðgerðarar so hóast teir arbeiða yvir og hóast vit hava gjørt teimum arbeiðspláss heima, so teir fáa arbeitt har eisini, klára vit ikki at avgreiða umsóknirnar fyri jól.

Hvussu nógvar umsóknir, tey klára at avgreiða, dugir hann ikki at siga.

Men tað skilst, at alt bendir á, at heilt nógvar koma at liggja eftir og kunnu ikki avgreiðast fyrrenn eftir jól.

*aki@sosialurin.fo*

**» Vit hava ikki nóg mikið av málsviðgerðarum at avgreiða næstan 1000 umsóknir í einum**

## Telefonin seinkar starvsfólki á ALS

Tað er rættiliga nógvur ágangur á telefonirnar hjá Arbeiðsloysisskipanini í hesum døgum.

Tað er serliga hóp-arbeiðsloysið, sum hevur tikið seg upp í kjalarvørrinum á, at Fiskavirking fór á húsagang, at stórt trýst er á Als.

Uttan at tað skal misskiljast, noyðist Ernst Jacobsen, stjóri í Als, at staðfesta, at tað órógvar arbeiðsgongdina rættiliga illa, tá ið nógv fólk ringja til Als við spurningum.

Hansara vinarliga áheitan á fólk, sum eru rakt av arbeiðsloysi, er sostatt, at tey í so stóran mun, sum gjørligt, heldur venda sær til fakfelagið hjá sær og fáa tey at hjálpa sær við ivaspurningum, heldur enn at ringja til Als.

Als hevur fimm málsviðgerðarar í samband við trygging og teir brúka í løtuni alla orku í at avgreiða umsóknir, so at so nógv arbeiðsleys, sum tilber, kunnu fáa útgjald fyri jól.

– Vit kunnu ikki vænta at hava nóg mikið av málsviðgerðarum til at vit skulu kunna avgreiða eina so stóra pulju av arbeiðsleysum í senn, sigur Ernst Jacobsen.

# 20.000 um mánaðir

Lógin um Als varð broytt í fjør so nú ber til at fáa í mesta lagi 80% av lønini hetta seinasta árið útgoldið í Als, men kortini fær ongin meiri enn 20.000 krónur um mánaðin í eitt ár og síðani 18.750 krónur í eitt ár.

Men útlendingar kunnu koma rættiliga illa fyri.

Útlendingar við varandi arbeiðsloyvi fáa útgjald úr Als, akkurát, sum øll hini.

Verri er hjá teimum, sum hava tað vanliga arbeiðsloyvi, har tey eru bundin at einum ávísum arbeiðsgevara.

Fer hesin ávísi arbeiðsgevarin á heysin, kunnu tey ikki fara til onkran annan arbeiðsgevara, tí tað hava tey ikki arbeiðsloyvi til.

Og tá ið tey ikki hava arbeiðsloyvi, eru tey heldur ikki tøk á arbeiðsmarknaðinum og sostatt hava tey ikki rætt til útgjald úr Als, sigur stjórin.

Hann leggur afturat, at nú øhh hendan stóra puljan av Fiskavirkin, kom í Als, má staðfestast, at nú er arbeiðsloysi tað hægsta hesi seinastu 10 árini

– Nú fara vit frá 1300 arbeiðsleysum, upp um 2000.

Hann sigur, at fyrst í 2000 kom tað niður á 1000 og tá varð ikki væntað, at tað fór longur niður, tí tað varð metta at vera lágt.

Men kortini kom arbeiðsloysið heilt niður á 300 fólk, áðrenn tað aftur fór at veksa so líðandi.

**» Tað verða mong, sum onki fáa til jóla**